**Norðurlendski týðarastuðulin**

Tá Nordbok og harvið eisini NABO (nevndin, sum umsat týðarastyrkin) var avtikið, varð í staðin settur á stovn nýggjur týðarastyrkur, sum skuldi stuðla týðingum millum norðurlendsku grannamálini. Høvuðsbroytingin í hesum var, at nú skuldi styrkurin umsitast nationalt, har sum hann fyrr var umsitin sentralt. Tað við siga, at teir pengarnir, sum eru játtaðir til at stuðla týðingum úr føroyskum til okkurt av grannamálunum, skuldi umsitast í Føroyum.

Í nevndini, sum sett var til at býta hesar pengarnar út, sita Guðrun Gaard, Heðin Klein og Kristina Petersen.

Árliga játtanin frá KKN er uml. 214.000 kr., og til umsitingarligar útreiðslur eru 25.000 kr.

Eitt umsóknarumfar hevur verið, bert ein umsókn kom inn, og tað var frá einum føroyskum forlagi í Keypmannahavn, sum vildi umseta føroyska skaldsøgu til danskt.

Vónandi verður tað frægari nú næsta umsóknarfreistin verður úti, men trupulleikin her er, at tað er ringt at skapa áhuga í øðrum norðurlondum fyri at fáa umsettar føroyskar bøkur. Tí hava vit í hesi nevndini og í nevndini í Rithøvundafelagnum umhugsa at fara undir tiltøk, sum kunnu fremja vitan um og útbreiðslu av  føroyskum bókmentum. Tað er møguligt, at nakað av peninginum, sum ikki verður brúktur til týðingar, kunnu brúkast til hesi útbreiðslufremjandi tiltøk, tað verður í løtuni kannað.

Vinaliga Guðrun Gaard